# Bakkin



*Edvard Joensen*

Nú fór hann. Bakkin, sum í nøkur ár hevur verið fyri hóttafalli. Veður og vindur tóku nú tað seinasta takið, og so skrædnaði.

Hann orkaði ikki meira. Misti enn eitt petti, sum tó ikki fór í havið beinanveg. Men tað fer seinni. Tí tá veturin aftur kemur, fer havið eisini at fáa meira veldi og taka alt meira til sín.

Alt nærri otar hann seg gomlu neystatoftunum. Hesum, sum kanska í øldir hava staðið her, tí teir, sum í síni tíð bygdu tær, hildu, at her stóðu tær so mikið væl og ovarlaga, at nú var eingin vandi.

Men sum tíðin leið, tók brimið alt meira burtur undan bakkanum. Og hann otaði seg bara longri niðan. Sløtt hella var undir, og hon vardi einki fyri nøkrum.

Men nú halda tey, sum eftir eru, at nokk er. Nú má hetta steðgast. Og so verða boð send eftir hjálp. Fáa fólk út í Mykines at stoypa garð. Bakkaverju kalla tey tað.

Betong, sum aðrastaðni viðhvørt verður hildið lítið um, tí slíkt, sum grønt er, verður lagt undir hetta evnið eins og asfalt.

Men her vilja tey hava betong í aftur bakkan. Sum eina bjarging, so ikki tey nýggjaru neystini, spælhús og slíkt, sum stendur nær, eisini verður tikið av brimi og tíðini.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og suðri og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 13 og 16 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi, seinni minni vindur. Stundum regn ella mjørki. Hitin millum 12 og 15 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin andøvsgul av vestri og ælingur, men sunnudagin upp í ein strúk av útsynningi og regn. Hitin millum 11 og 15 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 6 |
| Nuuk | 7 |
| Qaqortoq | 6 |
| Ammassalik | 7 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 15 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 17 |
| London | 21 |
| Tromsø | 20 |
| Bergen | 15 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 20 |
| Keypmannah. | 18 |
| Helsinki | 19 |
| Moskva | 22 |
| Berlin | 23 |
| Warzawa | 29 |
| Kiev | 25 |
| Bukarest | 27 |
| Paris | 23 |
| Madrid | 31 |
| Róm | 30 |
| Malorca | 29 |
| Athen | 31 |
| Malta | 26 |
| Tunis | 32 |
| Beijing | 31 |
| New Dehli | -- |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 13 |
| New York | 25 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 23 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | -- |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 14 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 1000 hPa. vestan fyri Írland fer norðureftir og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum mikunáttina.




**Í dag:**
Lágtrýstið sunnan fyri ísland stendur mestsum í stað og gevur óstøðugt veður á okkara leiðum komandi dagarnar.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 19/07 kl. 06⁰⁰–20/07 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 11,6°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,1 mm – mált frá 19/07 kl. 06⁰⁰–20/07 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juli: 42,2 mm




fæst á apotekunum kring landið

## VESTFALLSKYRRINDI

9. juli: Seinna kvarter
14. juli: Mánin longst frá jørðini
17. juli: Tendring
25. juli: Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 21. juli | 10.27 | 22.46 | 09.27 | 21.46 | 09.42 | 22.01 | 00.09 | 12.27 | 01.09 | 13.27 | 08.42 | 21.01 | 07.42 | 20.01 | 10.42 | 23.01 | 11.42 | — | 10.12 | 22.31 | 11.27 | 23.46 |
| 22. juli | 11.05 | 23.24 | 10.05 | 22.24 | 10.20 | 22.39 | 00.46 | 13.05 | 01.46 | 14.05 | 09.20 | 21.39 | 08.20 | 20.39 | 11.20 | 23.39 | 00.01 | 12.20 | 10.50 | 23.09 | — | 12.05 |
| 23. juli | 11.43 | — | 10.43 | 23.02 | 10.58 | 23.17 | 01.24 | 13.43 | 02.24 | 14.43 | 09.58 | 22.17 | 08.58 | 21.17 | 11.58 | — | 00.39 | 12.58 | 11.28 | 23.47 | 00.24 | 12.43 |
| 24. juli | 00.02 | 12.23 | 11.23 | 23.44 | 11.38 | 23.59 | 02.02 | 14.23 | 03.02 | 15.23 | 10.38 | 22.59 | 09.38 | 21.59 | 00.17 | 12.38 | 01.17 | 13.38 | — | 12.08 | 01.02 | 13.23 |
| 25. juli | 00.44 | 13.19 | — | 12.19 | — | 12.34 | 02.44 | 15.19 | 03.44 | 16.19 | 11.34 | — | 10.34 | 23.10 | 00.59 | 13.34 | 01.59 | 14.34 | 00.29 | 13.04 | 01.44 | 14.19 |

5 707265 100036 >